# Tann seinasti av teimu

## Ein framúr arbeiðsfelagi

**Eitt arbeiðsgrev, sum altíð leitar eftir loysnum og møguleikum. Tað er skoðsmálið, sum Jens Erik Magnussen fær frá sitandi FSF-forsetanum**



*Sitandi forsetin í FSF hevur bara gott at bera Jens Eriki Magnussen*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
jakup@sosialurin.fo

Í eini 22-23 ár hevur núverandi forsetin í FSF, Óli Holm, verið í nevnd saman við Jens Eriki Magnussen, og spurdur, hevur hann bara rósur at bera starvsfelaganum.

- Fyrst og fremst, so er talan um ein mann, sum kennir allar partar av føroyska fótbóltsheiminum í smálutir. 29 ár í nevndarbeiðnum hjá FSF hava givið honum óteljandi royndir. Ikki minst, tí hann hesi árini hevur verið partur av øllum nevndum okkara.

- Ikki minst meti eg, at vit fara at sakna hansara royndirílandsliðsarbeiðnum. Har hevur hann jú verið formaður í landsliðsnevndini í eini 15 ár, og tí kennir hann allar partar av altjóða spælinum í so máta. So eg taki tað fyri givið, at vit onkra tíðina koma at spyrja hann um góð ráð.

- Og so kann eg leggja afturat, at hann er ein persónur, sum er serstakliga góður at sita í nevnd við. Hann leitar altíð eftir møguleikum og loysnum, har onnur kanska síggja trupulleikar, og tað ber ofta við sær, at hann fær sera nógv burturúr.

- Men eins høgt, sum eg meti Jens Erik, eins væl skilji eg støðu hansara. Við meira enn fjórðings øld í nevndararbeiði okkara hevur hann so væl og virðiliga tænt sína hernaðarskyldu, og eg kann illa gera annað, enn bara ynskja honum alt tað besta, sigur Óli Holm.



Tá Jens Erik Magnussen tann 3. mars tekur sæti við nevndarborðið á FSF-aðalfundinum, verður hetta 29. aðalfundurin, sum miðvingurin er partur av. Samstundis verður hetta eisini tann seinasti av slagnum, tí Jens Erik hevur nú boðað frá, at hann ikki tekur við afturvali.

– Tað er ein avgerð, sum er rímiliga væl umhugsað. Í veruleikanum, so ætlaði eg mær als ikki at taka við afturvali fyri tveimum árum síðani, og tey boð gav eg eisini nevndini. Støðan var tó kanska nakað øðrvísi tá, tí nógv nýtt fólk var komið í nevndina, og tí mettu summi tað vera týdningarmikið at halda ein ávísan stabilitet. Og kundi eg hjálpa í hesum, so gjørdi eg tað fegin.

– Men hesa ferð haldi eg ikki, at tað vendst í so máta. Eg havi sitið í nevndini hjá FSF síðani stovnan í 1979, og nú man tíðin vera komin, har onnur skulu sleppa framat, sigur hann.

### Nógvar broytingar

Tá FSF varð sett á stovn í 1979, var Jens Erik partur av fyrstu nevndini. Sum hann sjálvur tekur til, so brúkti hann seg somikið nógv á einum stjórnarfundi hjá ÍSF, at hann brádliga varð settur í uppskot til sess í fótbóltsdeildini, sum tá virkaði undir ÍSF, og síðani hevur hann at kalla verið partur av mongu stóru broytingunum, sum føroyskur fótbóltur hevur verið fyri.

Og tær hava ikki verið smávegis. At byrja við á grúsvøllum, har glaðir amatørar undir leiðslu av øðrum amatørum dystaðust á vøllinum. Til tíðina í dag, har flestu spælarar í bestu deildini fáa pening fyri avrik síni, eins og venjarar og dómarar eisini fáa tað fyri síni, nú hesir eisini eru útbúnir til sítt yrki. Og ikki minst, so hava avbjóðingarnar á altjóða pallinum verið drívmegin, sum hevur vundið føroyskan fótbólt somikið langt, at vit í dag hava átta landslið á mans- og kvinnusíðuni, umframt tann infrastruktur, sum krevst til hetta arbeiðið.

### Roynt allar sessir

Og í hesum spælinum hevur Jens Erik verið partur av at kalla øllum tættum í føroyska fótbóltsheiminum. Fyrstu árini var hann kappingarstjóri og síðani formaður í kappingarnevndini hjá FSF.

Sum formaður í útbúgvingarnevndini var hann seinni við til at skipa fyri miðvísu menningini av føroysku venjarastættini, og í landsliðshøpi hevur hann í nógv ár verið maðuðrin við stóra orðinum. Ikki minst, tí hann gjørdist fyrsti – og higartil einasti – formaðurin í landsliðsnevndini, tá hendan varð sett á stovn fyri 15 árum síðani. Og sum nærum fastur partur av fíggjarnevndini, hevur hann eisini havt sína stóru ávirkan á tað arbeiði, sum har er framt.

### Fýra varðar

Tá litið verður aftureftir, eru tað sjálvandi nógvir tættir, sum kundu verið tikin fram. Men sjálvur hevur Jens Erik serliga hug at nevna fýra lutir, sum hann heldur hava havt stóra ávirkan á menningina av føroyskum fótbólti. Ella fýra varðar, um tú vilt.

– Tað hevði alstóran týdning, at fótbólturin flutti seg av grúsi og á graslíki. Tað gav heilt aðrar fortreytir fyri sjálvum spælinum, og var tí ein avgerandi broyting fyri allar spælarar í landinum.

– Harnæst haldi eg, at vit valdu rætt, tá vit í 80'unum løgdu okkum eftir eini miðvísari útbúgvingarætlan fyri fótbóltsvenjarar. Tað hevur gjørt, at vit í dag hava nakrar heilt aðrar fortreytir fyri spælaramenning, og nú sjálvt menningararbeiði eisini er fingið í fasta legu, er hetta ein víðari menning av venjaraútbúgvingini, sum farið varð undir tá.

– Limaskapurin í UEFA og FIFA vóru sjálvandi eisini sera týðandi stig at taka. Tað gav okkum avbjóðingar og møguleikar, sum vit valla kundu droymt um, og eisini á fíggjarsíðuni hevði hetta heilt aðrar møguleikar.